# Vejle vann DM undir taki

Um vikuskiftið var spælt um danmarksmeistaraheitið í innandura fótbólti. Vinnarin gjørdist Vejle, sum í finaluni spældi ímóti FC Nordsælandi. Finaludysturin var undirhaldandi, og endin var, at liðið úr Vejle, sum ikki hevur havt nógvar sigrar í fremstu deildini at fegnast um seinnu árini, vann 3-1. Bronsan endaði hjá SønderjydskE.



# Dortmund keypir í Tottenham

Fyri hálvum øðrum ári síðani keypti Tottenham Kevin-Prince Boateng úr Hertha Berlin. Spælarnir var tá roknaður sum eitt av størstu talentunum í týskum fótbólti, men uppihaldið í London hevur verið rættiliga miseydnað hjá 21 ára gamla miðvallarspælaranum. Um vikuskiftið leigaði Dortumd Boateng úr Tottenham fyri restina av kappingini.

Stjørnan-VB 25-24 (10-14):

# Vinnaraviljin vann

**VB hevði meistararnar í pottinum, men tær megnaðu ikki at basa ótroyttiliga stríðsviljanum hjá Stjørnuni, sum í evstu løtu kortini togaði sær stigini heim**

HONDBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Simona Petersen hevði ikki ein av sínum bestu døgum. Men hon hevði nakrar sera týðandi skoringar, tá Stjørnan um miðjan seinna hálvleik vann seg aftur á VB*

*Mynd: Norðlýsið*

Tær høvdu alla orsøk at iðra seg. Kvinnurnar hjá VB.

Undan dystinum varð sagt, at trýstið frá Tjaldri á VB kundi gerast sera stórt, um ikki okkurt fekst burtur úr dystinum hjá VB í Klaksvík. Og fyri tað allar mesta tóktist hetta eggja gestunum í Klaksvík at taka sær av øllum.

Fyrstu trý korterini av dystinum var nevnliga lítið og einki, sum bendi á, at Stjørnan skuldi fáa nakað sum helst burtur úr dystinum.

Ikki óvæntað legði Stjørnan stóran dent á at ansa Daivu Toumaite, men VB er ikki longur bara Daiva. Aukse Vysniaskaite og Gurið Mortensen sýndu í løtum stórspæl, og við nógvum variatiónum í álopsspælinum hevði verjan hjá Stjørnuni ovurstórar trupulleikar av at halda VB frá málinum.

Og so hjálpti tað ikki heimaliðnum serliga nógv, at tær ferð eftir ferð misnýttu opnar møguleikar. Eitt er, at VB hevur ein góðan málverja, men í fleiri førum gjørdu tær á heimaliðnum ikki uppgávuna hjá Astu Armanaviciute serliga trupla.

## Mistu høvdið

Og gongdin var neyvt tann sama, tá seinni hálvleikur. Um nakað fekk VB enn meira ferð á, og eitt skifti lúrdi veruligt sorl í luftini.

Men um miðjan seinna hálvleik kom spakuliga vend í. Fyrst og fremst tí kropssterka verjan hjá heimaliðnum nú veruliga byrjaði at fáa takið á álopsspælinum hjá VB. Hetta kostaði nógvar kreftir, og tað strongdi gestirnar, sum nú eisini byrjaðu at misnýtta opnar møguleikar. Og tá Kristina Griksaite um sama mundi togaði veruligt stórspæl fram, fór av álvara at knípa hjá gestunum.

Og tá so Stjørnan eisini byrjaði at skora, kom veruligur spenningur í. Simona Petersen hevði fyri tað nógva sitið á beinkinum, men hon fekk nøkur týðandi mál. Tað sama fekk Durita Christophersen, og tá mest stóð á, sýndi Dianne Møller, at hon eisini hevur sjáldsamar dygdir. Seinastu løtuna varð hon sett á veingin, og við fimm skoringum á rað eftir gott pressspæl togaði hon Stjørnuna upp á 24-23.

VB hevði um sama mundi mist Gurið Mortensen, sum fekk reytt kort fyri at toga í armin á leysum álopsspælara, tær megnaðu kortini at svara til 24-24.

Men hetta gjørdist eisini seinasta sprellið frá VB í dystinum. Durita Christophersen fekk seinasta orðið, og hóast Stjørnan megnaði at klodda ein bólt burtur seinasta hálva minuttin, so fekk VB ikki spælt seg ígjøgnum til málið, sum kundi givið eitt sera týðandi stig.

## Hugburðurin á muni

Meira enn nakað, so prógvaði sigurin – og seinasta korterið av dystinum – at Stjørnan enn sum áður hevur viljan og hugburðin, sum skal til, um tú skalt enda á ovastu rók. Sum fleirfaldir greipuvinnarar er lætt at staðfesta, at í Stjørnuni verður bara ein sigur góðtikið, og avrikið hesa ferð prógvaði eisini, at tær ikki gevast at stríðast, fyrr enn dómarin hevur bríkslað fyri seinastu ferð. Nakað sum hevur verið galdandi fleiri ferðir í ár, tá Stjørnan annars ikki hevur fingið spælið at koyra nóg væl.

Hjá VB er spurningurin kanska heldur, hvussu tær megna at snara høvdinum, soleiðis at tað eisini vendir rætt seinastu og avgerandi løturnar av dystinum.

Tí megnar VB at spæla tað spælið, sum tær spældu fyrstu 42-43 minuttirnar í Klaksvík, í ein heilan dyst, so verður sera trupult hjá nøkrum øðrum at standa teimum kurl. Hinvegin er einki loyndarmál, at skjýtur tú bert eitt mál seinastu 12 minuttirnar av einum hondbóltsdysti, so verður serstakliga trupult at fáa stig. Líkamikið, hvør mótstøðan er.

## FAKTA um dystin

**Stjørnan-VB 25-24 (10-14)**
**10 min:** 5-5
**20 min:** 7-9
**40 min:** 14-18
**50 min:** 21-23
**Málskjúttar**
**Stjørnan:** Durita Christophersen 8, Dianne Møller 6, Simona Petersen 3, Durita Ljósstein 2, Joan Midjord Djordjevic 2, Anna Kristina Samson 2, Durita Mikkelsen 1(1), Una Olsen 1
**VB:** Aukse Vysniaskaite 7(5), Rannvá Johannesen 6, Gurið Mortensen 4, Svava Vestergaard 3, Daiva Toumaite 2, Bára Mortensen 1, Laila Jespersen 1
**Brotskøst:** Stjørnan 1, VB 7
**Útvísingar:** Stjørnan 2, VB 2
**Diskvalifikatión:** VB 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Sámal Paulason & Kári Hansen

## Vildu meira

Fagnaðurin var ovurstórur á Stjørnu-spælarunum, tá tær við einum øgiligum endaspurti høvdu vissað sær sigurin á VB sunnudagin.

Eftir dystin fingu vit orð á Duritu Christophersen, og hon helt, at tað fyrst og fremst var stríðsviljin, sum tryggjaði teimum sigurin.

- Vit stríðast alla tíðina fyri sigrinum og vit trúgva alla tíðina uppá, at tað letur seg gera. Fyri steðgin brendu vit tó alt ov nógvar møguleikar, men vit hildu á fram at trýsta, og tað eydnaðist so eisini at enda.

*Sigurin ger, at tit nú eru trygt á odda í deildini. Var hetta tað, sum skuldi til, fyri at tryggja finaluplássið?*

- Nei. Vit mugu á ongan hátt byrja at taka tað róligt. Har eru nógvir dystir eftir at spæla, og teir skulu vinnast, áðrenn vit kunnu byrja at tosa um nakra finalu, heldur Durita Christophersen.

**-mørk**

## Mistu høvdið

Tær vóru í kjallaranum. Í trý korter hevði VB so ruddiliga takið á Stjørnuni, men seinasta korterið gekk alt galið, og Rannvá Johannesen hevði ilt við at seta orð á, júst hvat tað var, sum hendi.

- Eg veit ikki. Men seinasta korterið vil einki rigga hjá okkum. Tær koma bara tættari og tættari, og tá vit so eisini fáa eina útvísing, gerst tað enn tyngri hjá okkum.

*Seinast móti Stjørnuni togaðu tær eisini nógv inn í seinna hálvleiki, og móti Tjaldri skrædnaði av álvara eftir steðgin. Er orkan nóg góð hjá tykkum?*

- Móti Tjaldri haldi eg nú, at tað var galið alla tíðina. Men jú, orkan er nóg góð. Eg haldi heldur, at tað snýr seg um, at vit skulu vera meira klárar í høvdinum, tí vit vita jú av, at Stjørnan stríðist til tað seinasta.

*Vinnur Tjaldur sín dyst í morgin, eru tær bara tvey stig aftan fyri tykkum. Er tað eitt trýst, sum tit nú merkja?*

- Tað haldi eg ikki. Vit eru framvegis framman fyri Tjaldur, og tað eru fyrst og fremst vit sjálvar, sum gera av, um vit skulu røkka finaluni ella ikki, sigur Rannvá Johannesen.

**-mørk**